prinsin á, at teir gingu í fimta flokki saman í Chelsea í London í 1957, 9 ára gamlir. Síðani hevði lívsleið teirra verið sera ólík.

Harold var sonur ein ríkmann, vaks upp í einum fimmhæddahúsum í einum tí fínasta býlinginum í London, og endaði við at sova úti í býarpartinum Strand. Nú livdi hann av almannastuðli á einum ból-og-bita gistingarhúsi og seldi *Big Issue* á undirgrundarstøðini í Holborn.

Tá leiðir teirra skildust í 1957 fór Charles á góðan skúla og Harold fór á dýrasta privatskúla í Bretlandi. Í sjeytiárunum var hann dugnaligur journalistur, var reportari hjá Sun og gav eina bók út um flúgvandi borðiskar. Hon gjørdist nr. 8 millum mest seldu bøkur. Hann hevði verið giftur tvær ferðir og átti 3 børn.

Trupulleikarnir tóku seg upp, tá bæði pápin og stjúkmóðirin doyði í 1987. Hann hevði leingi verið heldur vátligur og gjørdist nú alkoholikari. Arvin uppá 30.000 pund søplaði hann burtur, og húsini misti hann eisini.



*Kina er tað landið í heiminum, sum hevur ein tann størsta búskaparliga vøksturin*

Charles prinsur segði við fjølmiðlarnar: *"Sjálvt um tey hava havt góðan uppvøkstur, hava mong ung í dag ilt við at varðveita álitið á sær sjálvum, tá tey møta tí øgiliga trýstinum í okkara nýmótans lívi. Tá eg hitti Harold Clives, fekk eg eina livandi áminning um, at mestsum ein og hvør kann enda við at sova úti. Vit liva í einari verð, sum gerst alsamt meira materialistisk og verðslig, har samleikin hjá fólki mangan einans verður roknaður eftir teirra avrikum og inntøku heldur enn eftir, hvussu nógv tey veita samfelagnum sum heild."*

Og Noreena Hertz tekur samanum:

*"20-ára nýliberala eksperimentið, sum byrjaði í Westminster og Washington, hevur ikki gagnað okkum øllum. Tann tradisjonelli hátturin at máta búskaparligan vøkstur, so sum bruttotjóðarframleiðsla pr. íbúgva ella vøkstur í bruttotjóðarframleiðsluni, fjalir veruleikan. Tað er ikki bara Harold Clive, sum er útihýstur frá vakstrargongdini, óteljandi mong onnur eru eisini útihýst."*.

Tann heimsumfatandi nýskoðanin móti nýliberalismu í 1980-unum og 90-unum skuldi javna livifótin millum rík og fátæk lond. Tað hendi ongantíð. Inntøkumunurin millum eystur-vestur og suður-norður er størri nú enn nakrantíð.

Heilivágurin hjá Heimsbankanum og IMF – strukturtillaging, liberalisering av handli og fíggjarviðurskiftum og minni eftirlit – hevur gjørt samráðingarmegina hjá fakfeløgunum veikari, ført til stórar privatiseringar yvir háls og herðar og forðað londum at økja tær almennu útreiðslurnar, so tey kundu nøkta vælferðartørvin. IMF og Heimsbankin kunna treyta lánveiting við kravi um, at londini skula góðkenna teirra búskaparligu sjónarmið.

Mangan versnaði sjúklingurin. Innlendis minkaði búskaparligi ójavnin í mongum londum frá 1945-70, men síðani hevur tað gingið øvugtan veg um allan heim. Í øllum teimum fyrrverandi kommunistalondunum eystanfyri, í mesta partinum av Latínamerika, og nógvastaðni í Suður-, Suðureystur- og Eysturasia er fíggjarligi ójavnin vaksin nógv tey seinastu 20 árini. Í Meksiko livdu 49% av fólkinum í fátækradømi í 1981, nú er talið 75%.

Heldur ikki lond, sum hava roynt at fylgja krøvunum úr Washington út í odd og egg, hava havt vinning av tí. Síðani 1994 hevur Suðurafrika stílað eftir, at landið skal gerast integreraður partur í heimsbúskapinum. Á summum økjum er liberaliseringin av handlinum farin longur, enn fyrst GATT og síðani WTO hava kravt. Stuðul kann ikki longur veitast klædnaídnaðinum, sum gav mongum arbeiði. Búskapargongdin hevur verið vánalig. Síðani apartheid varð tikið av hevur vøksturin í Suðurafrika verið lítil, arbeiðsloysið vaksandi, útbyggingin av almannaverkinum og undirstøðukervinum hevur verið óhugnaliga lítil. 10% av húsarhaldunum standa fyri næstan 50% av nýtsluni, meðan tey fátækastu 10% so dánt standa fyri 1%. Líkt er til, at tann strangi marknaðarstýrdi vinnupolitikkurin máar undan heldur enn styðjar sosiala endurreisn.

## Alt verður gjørt fyri at draga kapital til sín

Kina er tað landið í heiminum, sum hevur ein tann størsta búskaparliga vøksturin. Nú hevur Kina gjørt av at gerast limur í alheims handilsfelagsskapinum WTO. Landið noyðist so at liberalisera handilspolitikkin og avtaka alt tað ídnaðarpolitiska apparatið, sum hevur stuðlað statsfyritøkunum. Tær flestu av hesum fyritøkunum standa seg ikki í fríari kapping og við ongum studningi. Arbeiðspláss hjá 90 miljónum fólkum eru í vanda, og Kina hevur ikki eitt sosialt trygdarnet, sum kann taka ímóti so mongum.

Kili er eitt av londunum, sum hevur havt stóran búskaparvøkstur við at halda seg til tey nýliberalu búskaparprinsippini, men heldur ikki har verða tær vunnu ognirnar býttar millum fólkið. Bara ein minniluti fær fyrimun av vinninginum.

Myndugleikarnir í londum í triðja heiminum royna at fáa fleirtjóða fyritøkur at gera íløgur. Serligur tørvur er á íløgum nú, tá menningarhjálpin er minkað so nógv. Fyri at fáa íløgurnar fremja myndugleikarnir strong tiltøk: avmarka eftirlit ella taka tað av, lækka lønirnar, skerja vælferðina, og heilsutænasturnar, sum arbeiðsgevararnir gjalda til, verða avmarkaðar. Fakfeløgini verða niðurbundin. Í Kina eru hundraðtals fakfelagsfólk sett í fongsul ella send í arbeiðslegur. Fyritøkurnar sleppa at dálka umhvørvið nógv meira enn ynskiligt er, sæð frá samfelagsins sjónarmiði, mannarættindini verða brotin, myndugleikarnir látast ikki at síggja lógarbrot, alt samalt fyri at draga útlendskar íløgur til landið og alt í navni marknaðarbúskaparins.

Fyritøkurnar fáa profittin, men ráðharrar og korruptir embætismenn fáa eisini sín part. Somuleiðis tey, sum fáa arbeiði hjá útlendsku fyritøkunum. Vanliga rinda tær hægri løn enn heimligar fyritøkur.

Kina hevur havt fyrimun av at vera tað landið, sum hevur fingið flestar útlendskar íløgur tey seinastu árini. Árligi búskaparvøksturin hevur verið óvanliga stórur tey seinastu 20 árini og er nú 8,5%. Kortini livir ein fimtingur av fólkinum fyri minni enn ein dollara um dagin. Í nítiárunum hevði India størri framgongd í kunningartøkni enn nakað annað menningarland, men kortini livir helvtin av fólkinum fyri hálvan annan dollara um dagin. Munurin millum viðurskiftini í bygd og bý í Kina og India er nú so stórur, at tað ber ikki til at hugsa sær, at hesir heimar eru partar av sama landi. Í Nigeria liggja 80% av avlopinum hjá oljufyritøkunum eftir í landinum, men tað er bara ein lítil vald-stætt, sum fær gagn av tí.

Marknaðurin virkar ikki sum flóðin, ið lyftir øll før í senn. Verða bygnaðartillagingar og liberaliseringar framdar, uttan at tað er skylda samstundis at býta ágóðan, so tykist tað, sum at broytingarnar hava havt við sær, at nógvir sosialir bólkar hava tað verri, serliga teir viðbreknu og tey fátæku.

Ein leiðari í oljuvinnuni í Columbia segði tað soleiðis: *"Hesar verkætlanirnar eru góðar fyri stjórnina og okkum sum fyritøku… tær eru góðar fyri øll, sum duga at gera sær dælt av støðuni… men meirilutin hevur ongar fyrimunir… tær eru bara góðar fyri tey, sum duga at sleppa upp í part."*

Summastaðni verða fólk forfylgd, mótmæla tey íløgustreyminum, tí tey óttast, at prísurin gerst ov høgur. Fleiri fráboðanir eru um, at nigerianskir trygdarhermenn hava fongslað ella dripið fólk, sum hava mótmælt virkseminum hjá oljufeløgunum. Í november 1995 varð Ken Saro-Wiva í Nigeria avrættaður saman við átta øðrum eftir eitt rættarmál, sum ikki stóð mát við altjóða standard. Hann var politiskur aktivistur, skald og sjónleikahøvundur og stóð í fimm ár á odda fyri frígering av Ogonilandi og kravdi endurgjald frá Shell fyri umhvørvisskaða, sum Shell hevði voldað í landinum.

Í mai í 1997 bukaði indiska politiið 180 friðarlig mótmælisfólk uttan fyri portrið hjá Enron, sum síðani er komið í ringt orð. Fólk mótmæltu einum vatnorkuverki, tí tey hildu, at tað fór avstað við tí vatni, sum heldur lítið var av frammanundan, og at fiskur fór at doyggja. Í strembanini eftir útlendskum kapitali hava stjórnir í triðja heiminum ikki fýrt fyri at offra sínar egnu borgarar – og vinningin hava tær mangan stungið í egnan lumma.

Órættvísið í triðja heiminum er skakandi. Konvensjonellur lærdómur sigur orsakirnar vera, at londini eru búskaparliga tilafturskomin, og at demokratiið er veikt ella als ikki til staðar. Henda læran sigur, at alt hetta broytist og batnar, verður búskapurin latin upp og útlendskar íløgur gjørdar. Tað hevur við sær útbúgving og upplæring, sum so aftur gevur eina meira upplýsta arbeiðsmegi og umhugsna miðalstætt.

Noreena Hertz skrivar, tann konvensjonelli lærdómurin loypur um, at bæði arbeiðslagið og úrslitini av einum politikki, sum fremur marknaðarkreftirnar, kann gera munin á monnum størri enn tað, sum kann verða góðtikið. Sundurlyndið, sum vinnur fram í samfelagnum, kann beina fyri teimum góðu spádómunum um, hvat handilin og íløgurnar kunna hava við sær. Sum dømi nevnir hon ófriðin í Argentina í 2001. Tað er ein sterkur vitnisburður um skrædlið í sosiala kapitalinum, sum stendst av øktum misjavna: Um tað mundið fullu 2000 fólk hvønn dag niður undir fátækramarkið í Argentina.